SJÓVINNUSTÝRIÐ
FAROESE MARITIME AUTHORITY

Sept., 2014

# IMO: Kunning til skiparar og skipaeigarar – Yvirskipað um nýggj krøv, galdandi frá 1. januar og 1. juli 2015

## I Trygd og bjargingarvenjingar

Samtykt MSC.350/92) broytir tekstin í SOLAS Reg. III/19.2.2, sum krevur, at ferðamannaskip skulu veita ferðafólki trygdarkunning innan 24 tímar eftir, at tey eru komin umborð. Kravið verður nú hetta:

"*muster of newly embarked passengers shall take place prior to or immediately upon departure*".

Harafturat kemur ***nýtt*** krav við SOLAS Reg. III/19.3.3 and 19.3.6 viðvíkjandi *arbeiði í lokaðum rúmi og bjargingarvenjingar* (í tí høpi). Slíkar bjargingar skulu gerast umborð í minsta lagi annan hvønn mánað, og skulu fevna um:

- kekka og royna persónligu trygdarútgerðina (PPE), sum skal nýtast í.s.v. arbeiði í slíkum rúmum;
- kekka og royna samskiftisútgerðina og mannagongdir;
- kekka og royna tól til mátingar av luftini í lokaðum rúmi;
- kekka og royna bjargingarútgerð og mannagongdir; og
- geva undirvísing í fyrstahjálp og afturupplívingarháttum.

Reglurnar verða galdandi frá 1. januar 2015.

## II Rætting av regluni um *Bridge Navigation Watch Alarm System* (BNAWS)

Við samtykt MSC.350(92) broytist SOLAS Reglu V/19, sum krevur, at skip skulu hava BNAWS umborð. Kravið fevnir nú eisini um skip, ið eru bygd áðrenn 1. juli 2002. Undantaksreglur er gjørdar fyri skip, ið verður tikið úr rakstri med alla innan tvey ár eru liðin eftir gildiskomu. Undantaksreglurnar verða galdandi frá 1 januar 2015.

Skiftistíðin verður frá fyrsta sýni eftir 1 januar 2016 og 1 januar 2018, alt eftir slagi av skipi, og eigarar mugu leggja ætlanir fyri at fáa útgerðina uppá pláss í sambandi við sýn í hesi tíðini.

## III Broytingar í IMSBC Code

Samtykt MSC.354(92) setir í gildi broytingar í reglugerðini Sjóvinnustýrið hevur sent út kunning í sambandi við sjálvbodna kravið, sum kom í gildi frá 1 januar 2014 eins og nýggjari tíðindabræv í sambandi við endaligu gildiskomuna av krøvunum, sum er tann 1 januar 2015. Gevið Tekniska tíðindabrævi 10/2014 gætur.

Viðkomandi MSC-rundskriv eru MSC.1/Circ.1453, MSC.1/Circ.1454, MSC.1/Circ.1395/Rev.1. Sí eisini Teknisku tíðindabrøv nr. 01/2013 and 02/2013 frá Sjóvinnustýrinum

## IV Broytingar í altjóða reglugerðini *International Safety Management Code* (ISM-reglugerðini)

Samtykt MSC.353(92) setir í gildi strangari krøv til verkseting av ISM-reglugerðini. Partar, sum eru broyttir, eru "major non-conformity" og "trygg manning av skipum", sum setir strangari krøv til, hvat er nóg trygg manning av skipi.

Broytingarnar fara at krevja dagføring av ymiskum skjølum í "Safety Management System" felagsins, til tess at lúka krøvunum í ISM-reglugerðini.

Sí Tíðindabræv nr. 12/201f – Rakstur frá Sjóvinnustýrinum.

## V MARPOL Annex VI – endurskoðað og broytt

Frá 1. januar 2015 verða reglurnar viðvíkjandi útláti av svávuli broyttar og lækkar niður í 0.1%. Sí Tíðindabrøv nr. 13/2014 and 16/2014 – Rakstur frá Sjóvinnustýrinum.

## VI SOLAS, Kap. V Regla 19 – Krav til talgilda kortskipan, ECDIS

Frá 1. juli 2015 gerast hesi krøv galdandi fyri nýggj farmaskip størri enn 3,000 BT og fyri ***gomul ferðamannaskip*** størri enn 500 BT.

Sí Tíðindabræv nr. 01/2012 – Sigling, ið gevur yvirlit yvir gildiskomutíðir fyri ymisk skip alt eftir støðd.

--- 00 ---